Televarpi›:

# TV3 av skíggjanum




Televarpið byrjar eftir ætlan at senda umleið 25. november. Á myndini sæst eisini móttakarin (set-top boksin), ið verður at síggja í nógvum føroyskum húsum í næstum.

*Mynd: Álvur Haraldsen.*

**Hin 25. november verður Televarpið til reiðar at víðarisenda fylgisveinarásir til borgararnar í Havn. Tær flestu avtalurnar eru komnar upp á pláss, og nú er greitt, at væl umtókta rásin TV3 ikki verður við frá byrjan. Allar hinar rásirnar í verandi útboði hjá Rás Tórshavn verða kortini við**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*

Hin 25. november verður Televarpið, sum m.a. avoysir Rás Tórshavn, væntandi til reiðar at byrja at senda fylgisveinarásir til føroyingar.

Hetta upplýsir stjórin í Televarpinum, Tróndur Djurhuus. Tað er tó ikki vist, at Televarpið byrjar at senda hin 25. Verandi útgerð og skipanin hjá Rás Tórshavn skal takast niður. Tað ganga væntandi nakrir dagar, áðrenn útgerðin hjá Televarpinum er riggað til, soleiðis at klárt er at byrja at senda.

Afturat hesum skal Televarpið eisini hava frekvensloyvi frá Fjarskiftiseftirlitinum til at senda sínar talgildu(digtalu) sjónvarpsrásir.

– Við vera væntandi til reiðar 25. november, men vit hava sett nakra dag, har vit byrja at senda enn, tá ið vit eisini skulu bíða eftir øllum loyvum og Tórshavnar kommuna skal eisini sleppa at enda sítt virksemi, sigur Tróndur Djurhuus.

Sostatt er tað ikki heilt greitt, nær ókeypis sjónvarpstænastan hjá Tórshavnar kommunu syngur síðsta ørindið, men tað verður mestur í einum av døgunum undan 25. november.

Televarpið kann byrja at senda til borgarar í Havn, á Skálafjørðinum og Nólsoy, uttan at hetta ávirkar Rás Tórshavn, men byrjað verður væntandi ikki fyrr enn sløkt er fyri Rás Tórshavn, soleiðis at alt verður sett í gongd samstundis.

Føroya Tele eigur 100% av partapeninginum í Televarpinum, sum verður rikin leys frá Føroya Tele.

## Ókeypis til 1. januar

Fyri at síggja rásirnar hjá Televarpinum krevst ein sokallað set-top boks. Tað er hendan boksin, sum ger talgilda signalið um til sjónvarpsmyndir. Tað verður heldur nógv at taka feil av við hesum boksunum, tí tað verður nevniliga bert tann eina boksin, sum fólk kunnu keypa. Hendan boksin er av merkinum Force, og prísurin fer, sambært Tróndi Djurhuus, at liggja niðanfyri 2.000 kr. Tað verður ikki Føroya Tele, sum fer at selja boksirnar sjálvir, men hinvegin ymsir handlar. Tað verða so hesir, sum fara at áseta sín egna vinning og sostatt eisini samlaða prísin hjá kundanum. Tróndur Djurhuus roknar tó fyri vist, at prísurin fer at liggja niðanfyri 2.000 kr.

Televarpið fer at senda umvegis UHF-netið, og hetta ger, at fólk í flestu førum kunnu nýtast sína verandi útgerð og set-top boksina til at síggja Telepvarpið.

Edvard í Skorini Joensen, tøkningur hjá Føroya Tele, sigur, at teir hava royndarkoyrt útgerð í Havn, og hetta hevur í flestu førum riggað væl við verandi útgerð, sum eru at finna í húsum – eisini við vanligum “inni-antennum” í støðum. Hann leggur afturat, at summi fólk mestur verða noydd at skifta sína útgerð út fyri at síggja Televarpið. Hetta er serliga galdandi fyri eldri útgerð.

Til 1. januar verður tað ókeypis at síggja Televarpið, upplýsir Tróndur Djurhuus. Gjaldast skal sjálvandi fyri boksirnar, men inntil 1. januar verður tað sum í gomlum døgum hjá í øllum førum borgarum í høvuðsstaðnum við ókeypis fylgisveinasjónvarpi.

Televarpið fer í fyrstu atløgu at senda í Havn, í Nólsoy og pørtum av Skálafjørðinum. Stutt eftir fara kollfirðingar eisini at síggja Televarpið. Her skulu tó onkrar tekniskar broytingar gerast fyri at dekka alla bygdina. Hetta fer kanska at gera móttøkuna eitt sindur óregluliga at byrja við. Áðrenn árið er runnið verður Televarpið væntandi klárt at senda í Klaksívk, Fuglafirði og Gøtu eisini. Ætlanin er at øll skulu fáa møguleikan at keypa sær set-top boksina, og tí fer sølan væntandi í gongd nakað skjótt.

Júst sum við øðrum digitalum móttakarum krevst ein móttakara til hvørt sjónvarp. Arbeitt verður við einari loysn við høvuðsmóttakara fyri hvørt hús, men hetta liggur longur frammi í tíðini.

Tað ber til at knýta fleiri sjónvarp saman í ein móttakara, men so noyðist øll at síggja somu rásina.

## Canal+ og hinar

Rásirnar, sum Televarpið fer at bjóða út, eru allar kendar rásir. Av teimum verandi hjá Rás Tórshavn vera allar við uttan TV3. Væl umtókta TV3 kann koma á skíggjan aftur seinni, men verður ikki við frá byrjan.

Canal+ verður eisini við, og DR verður somuleiðis í útboðinum. Rásirnar verða seldar í pakkum. DR og Canal+ er lutfalsliga dýrar rásir, og her skulu fólk so nakað longur niður í lumman fyri at síggja. Samráðingarnar við DR eru ikki lidnar enn, men DR verður so við. Tað er so spurningurin, hvussu nógv hetta fer at kosar

Tann minsti og bíligasti pakkin verður við umleið 20 rásum. Teirra millum verður SvF og ein sokallað info-rás. Hendan rásin fer í fyrstu atløgu at senda upplýsingar, men møguleikin er fyri, at hendan rásin fer at senda føroyskt tilfar seinni. Fyritøkur og fólk kunnu so keypa sær senditíð. Tróndur Djurhuus sigur, at teir hava fingið fleiri fyrispurningar. Hann leggur dent á, at tað undir ongum umstøðum verður Føroya Tele, sum fer at framleiða sendingar sum fjølmiðil.

Av øðrum rásum hjá Televarpinum kann nevnast God Channel, sum er ein kristilig rás. TV Danmark 1 og TV Danmark 2 verða væntandi eisini við. Eisini verður samráðst við Eurosport um eina rás afturat frá teimum, umframt MUTV, sjónvarprásin hjá Manchester United.

Rásir sum TV2, DK4, NRK og aðrar norðurlendskar verða ikki at síggja hjá Televarpinum. Talan verða um enskar og danskara rásir.

Ætlanin er eisini at bjóða útvarpsrásir, men hetta verður væntandi ikki við frá byrjan.



# Porno á skíggjan

**Canal+, sum er ein av rásunum í útboðinum hjá Televarpinum, sendir pornografiskt tilfar. Endalig støða er ikki tikin til, um Televarpið fer at senda porno. Varafútin sigur tað vera sera ivasamt, um hetta kann forbjóðast**

SJÒNVARP
*Heri á Rógvi*



*Tað er líkt til, at einki er til hindurs fyri, at Televarpið í næstum kann fara at bjóða endurvarpa porno. Eingin endalig avgerð er kortini tikin í málinum.*

Millum rásirnar, sum Televarpið fer at senda, tá virksemið væntandi byrjar í komandi mánað, er Canal+. Franska rásin, ið norska Telenor umsitur í Norðanlondum, sendir hvørt kvøld pornografiskar filmar. Hesar kunnu eitt ótal av føroyingum sum er síggja sum kundar hjá Canal Digital, ið bjóðar Canal+.

Tróndur Djurhuus, stjóri fyri Televarpið, sigur, at teir hava ikki tikið støðu til, um hetta verður við á kervinum hjá Televarpinum. Í løtuni verður kannað, hvørjar heimildir Televarpið hevur.

– Vit halda okkum sjálvandi til landsins lógir, sigur Tróndur Djurhuus.

Hann vísir á, at teir ikki eru nakar fjølmiðil, t.e. tað er ikki Televarpið, sum sendir sendingar, filmarnar ella annað. Televarpið endurvarpar og harvið er útbýtari fyri hesar rásirnar. Hetta skal skiljast soleiðis, at tað eru Telenor ella hvør tað skal vera, sum er sendari og ikki Televarpið.

– Vit hava als einki ynski at virka sum fjølmiðil. Tað einasta redaktionella virksemið, vit gera, er at velja rásir út, sigur Tróndur Djurhuus.

## Ivasamt

Finn Ougaard, varafúti, sigur, at vit á hesum økinum eru í einum "gráum øki".

– Eg meti tað vera sera ivasamt, um tað ber til at forbjóða einum útbýtari sum í hesum førinum at senda pornografiskt tilfar, sigur Finn Ougaard.

Hann greiðir frá, at tað í Føroyum ikki er loyvt at senda pornografiskt tilfar alment, sambært revsilógini. Tað er tó, sambært Finn Ougaard sera ivasamt og ein tulkingarspurningur, um Televarpið í hesum førinum er sendari av hesum.

§ 234 í revsilógini ger m.a., at Sjónvarp Føroya ella nakar annar ikki hevur loyvi at senda pornografiskt (utugtigt) tilfar.

Fólk í Føroyum kunnu tó frítt bíleggja sær pornografiskt tilfar uttanlanda. Tað er heldur ikki nakað forgjørt í, at fólk móttaka pornografiskar sendingar úr útlandinum umvegis parabolina.

– Tað er ringt at gera nakað við hetta, soleingi fólk ikki vísa tað alment. Tað er so ein tulkingarspurningur, hvat hugsar verður um, tá avgerðast skal, hvør sendarin er, sigur Finn Ougaard.

Hann vísir á, at vit í Føroyum enn ongan dóm hava havt hesum viðvíjandi.

– Í síðsta enda verður tað so dómstólurin, sum ger av, hvussu lógin skal tulkast, sigur Finn Ougaard.

Varafútin sigur, at teir ongar ætlanir hava at granska víðari í málinum um fylgisveinarásirnar og pornografi í Føroyum fyribils, soleingi ongin tilburður ella hending verður fráboðaður løgregluni.

Í Lovbekendtgørelse nr. 215 frá 24.06.1939. Seinast broytt við Kongelig Anordning nr. 818 af 3. November 1997 stendur at lesa:

§ 234. Med Bøde, Hæfte eller under skærpende Omstændigheder med Fængsel indtil 6 Maaneder straffes den, som

1) tilbyder eller overlader en Person under 18 år utugtige Skrifter, Billeder eller Genstande,

2) offentliggør eller udbreder eller i saadan Hensigt forfærdiger eller indfører utugtige Skrifter, Billeder eller Genstande,

3) foranstalter offentligt Foredrag, Forestilling eller Udstilling af utugtigt Indhold.

## Ber til

Tøkniliga – eins og løgfrøðiliga – er eingin forðing fyri at sperra fyri ávísum sendingum. Fólk kunnu gera hetta sjálvi á móttakarunum (set-top boksini), har tey kunnu innstilla tólið til at hava svartan skíggja á ávísar tíðir. Eisini kann útbýtarin, Televarpið, sløkkja fyri ávísum sendingum. Hetta skuldi verið í tráð við lógina um kringvarp, sum annars ikki loyvir at sendingar verða redigeraðar, men sendar í fullum líki.

Spurningurin er so, um føroyingar sleppa at síggja porno umvegis dóttirfyritøkan hjá Føroya Tele. Sum nú hevur ein stórur partur av føroyingum møguleikum at síggja pornografi. Spurningurin er so eisini, um tað er nakar munur á at keypa porno frá Canal Digital umvegis tín radiohandil ella frá Televarpinum?

